Dagf. 22. november 2021
HMR J. nr. 21/23235-12

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-079/2021 eftir § 52a í tingskipanini um tal av læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki seinastu árini, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv øktist ella minkaði talið av ávikavist læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum frá september 2011 til september 2015?

2. Hvussu nógv øktist ella minkaði talið av ávikavist læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum frá september 2015 til september 2019?

3. Hvussu nógv er talið økt ella minkað av ávikavist læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum frá september 2019 til í dag (frároknað eyka starvsfólk í sambandi við koronu)?

Svar:

Til spurning 1, 2 og 3

Niðanfyri verður lýst, hvussu nógv talið er økt ella minkað av læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum í teimum tíðarskeiðum, sum spyrjarin spyr um. Fyrst verður støðan í sjúkrahúsverkinum lýst, harnæst støðan í ávikavist Kommunulæknaskipanini og Gigni.

Sjúkrahúsverkið

Sambært sjúkrahúsverkinum hava tey biðið um og fingið yvirlit frá Gjaldstovuni yvir talið av starvsfólkum í øllum Sjúkahúsverkinum tíðarskeiðið 2011 til 2020.

Í fyrispurninginum verður spurt um ársverk í valskeiðum, t.d. september 2011 til september 2015. Ársroknskapurin hjá teimum trimum sjúkrahúsunum fylgir kalendaraárinum, frá januar til og við

desember, og til ber ikki at fara niður í mánaðir, tá ið tað umræður tal av starvsfólkum. Tí er 2021 heldur ikki við í tølunum hjá Sjúkrahúsverkinum.

Tað er ein avbjóðing at taka starvsfólkini burturúr tølunum, sum hava við koronu at gera fyri sjúkrahúsverkið. Fyri Landssjúkrahúsið eru tey tikin burtur úr, sum beinleiðis eru sett á deildum, sum greitt hava havt við koronuvirksemið at gera, t.d. á Koronudeildini, men tað gevur neyvan heilt røttu myndina. Tí á øllum trimum sjúkrahúsunum hava allarflestu starvsbólkar arbeitt sera nógv við koronu, samstundis sum arbeiðið í 2020 í tíðarskeiðum varð øðrvísi skipað vegna koronustøðuna.

Út frá tilfarinum frá Gjaldstovuni, hevur Sjúkrahúsverkið gjørt talvuna niðanfyri, ið lýsir broytingina av ársverkum í Sjúkrahúsverkinum tíðarskeiðið 1. januar 2011 til 31. desember 2020.

Talva 1

Sjúkrahúsverkið	**2011-15**	**2016-19**	**2020**	**2011-20**
Læknar	12,79	11,53	4,45	28,76
Sjúkrarøktarfrøðingar	6,77	36,89	10,01	53,67
Onnur heilsustarvsfólk	- 12,98	7,54	5,92	0,48
Onnur starvsfólk	- 1,71	24,21	2,97	25,47
í alt	**4,88**	**80,17**	**23,34**	**108,39**

Við teimum fyrivarnum, sum greidd eru frá omanfyri, so hevur samlaði vøksturin av ársverkum árini 2011 til og við 2020 verið 108,39. Fyrsta tíðarskeiðið 2011-15 vaks samlaða talið við knapt 5 ársverkum. Talið av læknum, íroknað konsulentar, vaks hetta tíðarskeiðið við knapt 13, meðan talið av øðrum heilsustarvsfólkum minkaði á leið tað sama.

Tíðarskeiðið 1. januar 2016 til 31. desember 2019 vaks talið av ársverkum mest, nevniliga 80,17. Serliga vaks talið av sjúkrarøktarfrøðingum – knapt 37 - og øðrum starvsfólkum - umleið 24 - hetta tíðarskeiðið. Onnur starvsfólk er m.a. aðrir limir í Starvsfelagnum enn sjúkraflutningsstarvsfólk og limir í akademikara- og tænastumannafeløgum. Vit skulu gera vart við, at sálarfrøðingar eru í hesum høpi undir onnur starvsfólk, tí tey eru í limir í Akademikarafelagnum.

Í 2020 hevur vøksturin hildið fram. Frá 1. januar til 31. desember 2020 komu gott 23 ársverk aftrat í Sjúkrahúsverkinum. Tá eru tey drigin frá, sum beinleiðis eru sett á deildum, sum burturav hava havt við koronu at gera. Talan er umleið 9 ársverk í hesum sambandi.

Tá er vert at nevna, at tá ið samanberingar verða gjørdar millum tíðarskeiðini 2011-2015 og 2016-2019, skal tað havast í huga, at fyrra skeiðið var merkt av búskaparstøðuni, sum var í landinum stutt eftir alheims fíggjarkreppuni, ið eisini merktist í Føroyum. Tí hevur tað í hesum tíðarskeiði ikki verið sama rásarúm til at gera tær somu fíggjarligu raðfestingarnar, sum árini eftir hetta.

Tað kann harumframt nevnast, at tað t.d. í 2020 eru gjørdar aðrar størri fíggjarligar raðfestingar í heilsuverkinum, ið eru týdningarmiklar, men ikki síggjast aftur í starvsfólkahópinum. Í hesum sambandi kann t.d. nevnast ókeypis sálarfrøðilig viðgerð, umframt størri KT-verkætlanir.

Kommunulæknaskipanin og Gigni

Sambært Heilsutrygd er tað í hesum føri ógvuliga trupult at svara spurningunum býtt á tíðarskeið, t.d. frá september 2011 til september 2015, tá ið tað viðvíkur tal av starvsfólkum í ávikavist Kommunulæknaskipanini og Gigni. Í talvu 2 verða broytingar í ársverkum tí lýstar frá januar til desember fyri hvørt ár. Í 2021 tó frá januar til 31. oktober.

Tal á kommunulæknaviðtalum											
Ár	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**jan. til okt. 2021**
Tal á kommunulæknaviðtalum	**30**	**30**	**30**	**30**	**30**	30	31	33	34	34	34
Kommunulæknar í føstum starvi											
Ár	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**jan. til okt. 2021**
Ársverk	**20,5**	**21,6**	**21**	**22,7**	**21,7**	19,4	17,9	22,5	25	27	25
Sjúkrarøktarfrøðingar í kommunulæknaviðtalum											
Ár	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**jan. til okt. 2021**
Ársverk	**2,6**	**4,6**	**4,5**	**4**	**5**	9,2	9,5	8,8	9,5	7,2	7,3
Læknaskrivarar í kommunulæknaviðtalum											
Ár	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**jan. til okt. 2021**
Ársverk	**2,5**	**2,6**	**2,6**	**3,3**	**3,3**	2,9	3,8	1,2	0,7	1	1,5
Sjúkrarøktarfrøðingar hjá Gigni											
Ár	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**jan. til okt. 2021**
Ársverk	20,16	20,18	20,36	21,85	**21,42**	21,95	22,02	21,88	21,37	22,42	21,69

Talið á kommunulæknaviðtalum er økt í tíðarskeiðinum 2016 til 2021 við 4. Í 2017 kom ein viðtala afturat í Eiðis læknadømi. Í 2018 komu tvær viðtalur afturat. Ein í Suðurstreymoyar læknadømi og ein í Skálafjarðar læknadømi. Í 2019 kom ein viðtala afturat í Suðurstreymoyar læknadømi. Soleiðis hava vit í dag 34 viðtalur ella kommunulæknastørv í Føroyum.

Í teimum viðtalum, sum ikki eru mannaðar við kommunulækna í føstum starvi, røkja skiftandi avloysarar størvini. Hesir telja ikki við í ársverkum. Tí framgongur talið á kommunulæknaviðtalum ovast í talvu 2, og skal ikki blandast við ársverk.

Talið á sjúkrarøktarfrøðingum í kommunulæknaskipanini økist og minkar, alt eftir hvussu nógvir kommunulæknar eru í føstum starvi. Ein kommunulækni í føstum starvi setur síni egnu fólk, og eru tey ikki við í hesum tølunum. Tað sama er galdandi fyri læknaskrivarar.

Út frá tilfari frá lønar- og leiðslukunningarskipanini hevur Heilsutrygd gjørt talvu 3, ið lýsir broytingina av ársverkum hjá Heilsutrygd í áðurnevnda tíðarskeiði út frá teimum fortreytum, sum eru nevndar omanfyri.

Talva 3

Broytingar í ársverkum				
	2011-2015	**2016-2019**	**2020-2021**	**2011-2021**
Tal á kommunulæknaviðtalum	**0**	**4**	**0**	**4**
Kommunulæknar í føstum starvi (ársverk)	**1,2**	**5,6**	**-2**	**4,5**
Sjúkrarøktarfrøðingar í kommunulæknaskipanini (ársverk)	**2,4**	**0,3**	**0,1**	**4,7**
Læknaskrivarar (ársverk)	**0,8**	**-2,2**	**0,5**	**-1**
Heilsufrøðingar, Gigni (árverk)	**1,26**	**-0,58**	**-0,73**	**1,53**
Í alt	**5,66**	**7,12**	**-2,13**	**13,73**

Við teimum fyrivarnum, sum greidd eru frá omanfyri, so hevur samlaði vøksturin av ársverkum árini 2011 til og við 2020 verið 13,73. Av teimum 13,73 hoyra fýra til talið á kommunulæknaviðtalum.

Frá 2011 til 2015 vaks samlaða talið við 5,6 ársverkum.

Frá 2016 til 2019 vaks talið á kommunulæknum í føstum starvi við 5,6 ársverkum. Tað er eisini í hesum tíðarskeiðinum, at fleiri nýggjar kommunulæknaviðtalur verða settar á stovn.

Í tíðarskeiðinum januar 2020 til oktober 2021 er talið minkað við 2,13 ársverkum. Hesi tølini siga ikki, at færri læknar arbeiða, men at færri kommunulæknar eru í føstum starvi, meðan avloysarar røkja størvini. Heilsutrygd boðar annars frá, at Kommunulæknaskipanin og Gigni hava ikki verið merkt nevnivert av korona.

Samlaði vøksturin í ársverkum hesi árini er sostatt øktur við 13,73. Størsta økingin er innan kommunulæknar, og eru í hesum tíðarskeiðinum 4 nýggj kommunulæknastørv stovnað. Av teimum 34 størvunum eru í dag 9 mannað við skiftandi kommunulæknaavloysarum.

Heilsumálaráðið, 22. november 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður